# Nøvn

## 15 ár síðani fyrsta Herfølge-dystin

Í dag eru liðin júst 15 ár, síðani fótbóltsspælarin Jákup Mikkelsen spældi fyrsta dystin fyri danska felagið Herfølge. Jákup Mikkelesen flutti til Danmarkar í august 1994, og 27. august árið eftir spældi hann fyrsta dystin fyri besta liðið hjá Herfølge. Dysturin var ímóti Lyngby, og á liðnum hjá Lyngby var ein annar klaksvíkingur, nevniliga Todi Jónsson. Lyngby vann dystin 2-0.

Jákup Mikkelsen spældi seks kappingarár fyri Herfølge, og samanlagt vardi hann málið í 136 dystum. Hann skoraði eisini tvey mál – bæði vóru við brotssparki.

Í ár eru eisini liðin 10 ár, síðani Herfølge við Jákup Mikkelsen í málinum, tók øll á bóli og vann danska meistaraheitið.

Jákup Mikkelsen spældi í Herfølge fram til mai mánað 2001, tá ið hann flutti til Molde í Noreg at spæla. Síðani hevur Jákup Mikkelsen spælt fyri Partick Thistle í Skotlandi og føroysku feløgini KÍ, B36 og ÍF.



*Jákup Mikkelsen í málinum hjá Herfølge*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




# Ráðgevi til Vinnuhúsið

Vilt tú vera við til at bera verandi vinnu framá? Megnar tú at fara í dýpdina og at arbeiða breitt? Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt? So er eitt spennandi starv at søkja í Vinnuhúsinum!

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir ráðgeva til Vinnuhúsið. Sum ráðgevi fert tú at gera vinnuligar, samfelagsligar og búskaparligar kanningar, umframt at arbeiða fyri vinnugreinafeløg.

Arbeiðið fevnir um at

- gera vinnuligar og samfelagsligar greiningar
- gera frágreiðingar og lýsingar av málum
- samskipa uppgávur fyri nevndir í vinnugreinafeløgunum
- vera við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum

Í hesum sambandi krevst tætt samskifti við leikarar í føroysku vinnuni og við myndugleikar.

Vit vænta, at tú

- hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir
- hevur kunnleika til føroyska vinnu og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. sept. 2010.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, Maritu Rasmussen, tel. 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038, FO-110 Tórshavn

sansir.fo

Vinnuhúsið er felags heiti fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum umframt føroysku vinnufeløgini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum gevur politiska ávirkan.
Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum, sí eisini www.industry.fo.

Smærugøta 9A // FO-100 Tórshavn // Tel: +298 30 99 00 // Fax: +298 30 99 01 // industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY